

# Annika Ol

**Løgtingskvinnan skal giftast um ein góðan mánað, men leygardagin tóku familjan hana og komandi mann hennara á bóli og høvdu tey til almenna framsýning í Vágsbotni í dýrdarveðrinum seinnapartin leygardagin**

*Her sita Annika Olsen, løgtingskvinna og komandi maður hennara, Jacob Horn, til almenna framsýning í Vágsbotni seinnapartin leygardagin ímeðan Sigrid Rasmussen spælir violin fyri teimum og kokkurin á Toscana hyggur at*

POLTERABEND

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tá ið Annika Olsen gníggjaði svøvnin úr eygunum í dýrdarveðrinum leygarmorgunin, grunaði hon ikki, at hetta skuldi blíva ein heilt serligur dagur.

Tann 5. juli skal hon giftast við Jacobi Horn, telduverkfrøðingi í nærverkinum, men tað kemur nokk ikki so óvart á hana.

---

# Hundraðtals fólk søgdu Heðini farvæl



*Á móttøku í Norðurlandahúsinum fríggjadagin nýttu nógv fólk høvið at takka Heðini Mortensen fyri drúgva tænastu fyri ítróttinum í Føroyum*

**Leygardagin endaði eitt hendingaríkt tíðarskeið í føroyskum politikki, tá ið Heðin Mortensen legði frá sær sum ÍSF forseti eftir heili 28 ár í sessinum. Í fríggjadagin nýttu hundraðtals fólk høvið at hitta hann á stórfingnari móttøku í Norðurlandahúsinum**

MÓTTØKA

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Seinnapartin í fríggjadagin var stór móttøka í Norðurlandahúsinum í sambandi við, at Heðin Mortensen í morgun leggur frá sær sum forseti í ÍSF eftir at hava rókt starvið í heili 28 ár.

Hetta er tað longsta, nakar norðurlendingur hevur sitið á ovastu ítróttarrókini.

Tað var ein drúgv skrá á móttøkuni har verjin hjá ítróttinum í Føroyum, Jóannes Eidesgaard, løgmaður, varaforstin í ÍSF, Petur Elias Petersen og forsetin í Fótbóltssambandinum, Høgni í Stórustovu, fluttu fram røðu.

Annars var fimleikaframsýning, tónleikur.

Heðin Mortensen fekk eisini heilsan frá ítróttarsambandinum í Íslandi og forsetin í danska ítróttarsambandinum var komin til Føroyar á móttøku og hann segði eisini nøkur orð.

Avgerðin um at leggja frá sær er ikki komin brádliga, tí Heðin Mortensen sigur, at tað eru tvey ár síðani at hann tók avgerðina um at nú var stundin komin at lata nýggjar kreftir koma framat.

## Avgjørt ikki lætt

Men í samrøðu við Rás2 seinnapartin fríggjadagin viðgekk hann, at tað er avgjørt ikki lætt at leggja frá sær og at tað er við sorgblídni at hann nú sigur farvæl eftir at hava brúkt helvtina av lívinum upp á ítrótt.

Hinvegin fer hann neyvan at sleppa ítróttinum heilt, tí verður boð eftir eini hjálpandi hond til okkurt, er hann til reiðar at taka eitt tak.

**Grunnurin til frama fyri samstarvi og fatan millum Nuuk – Reykjavík – Tórshavn**

Nú verður aftur møguleiki at søkja stuðul úr felagsgrunninum Nuuk – Reykjavík – Tórshavn. Ætlanin er í juni mánaði at taka avgerð um veitan av stuðli.

Tórshavnar býráð heitir tí á einstaklingar, feløg o.o., ið halda seg koma undir treytirnar fyri stuðli, um at senda býráðnum umsóknarblað við frágreiðing um tiltakið, nær tað verður og um mettan kostnað. Hetta umsóknarblað fæst í Snarskivuni ella inni á heimasíðuni hjá kommununi.

Meiri fæst at vita um treytir við at venda sær til Jens M. Poulsen, kommunustjóra, telefon 30 20 10.

Umsókn merkt »Nuuk – Reykjavík – Tórshavn« eigur at vera Tórshavnar kommunu, postsmogu 32, 110 Tórshavn, í hendi seinasta lagi 3. juni 2008.

Býarstýrini Nuuk, Reykjavík og Tórshavn hava sett pening í grunnin, hvørs endamál er at veita fíggjarligan styrk til tiltøk ella annað, ið kann fremja og menna samstarvið og fatanina millum hesar kommunur og borgarar teirra.

Tórshavnar kommuna

